Sosialurin
FISKIVINNUBLAÐIÐ
2002



*Sólborg avmyndað beint eftir at hon hevði lagt at við molan í Havn júst heimkomin úr Eysturgrønlandi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Rækjuprísurin skramblar niður:

# Rækjumenn í døpurhuga

FISKIVINNA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Tað átti at verið ein gleðilig hending at komið heim undan Eysturgrønlandi, einum tí mest harðbalna farvatni í øllum heiminum, og tað er eisini gleðiligt, men tað var 40 prosent meira gleðiligt í fjør enn tað er í ár.

Myndin sýnir Sólborg, sum kom heim av rækjumiðunum í Eysturgrønlandi í gjár. Teir hava fingið fisk, hava ikki verið leingi burtur, og hava fiskað kvotuna sum er 230 tons. Sólborg eigur tvær rækjukvotur í Eysturgrønlandi.

- Um hesa tíðina í fjør var rækjuprísurin 40 prosent hægri enn í ár. Og ikki um at tala japanrækjurnar. Vit fingu 160 krónur fyri kiloið fyri nøkrum árum síðan, í dag fáa vit ikki 50 krónur. Orsøkin er, at russar fáa so nógvar góðar og stórar rækjur við Kamsjatka hálvoynna, og hesar hava útkonurrerað eysturgrønlandsrækjurn, sigur Ejler Jacobsen, sum er reiðari og eigari av Sólborg.

Hví er rækjuprísurin so lágur, at rækjuflotin er um at fara á húsagang?

- Orsøkin er, at alt ov nógvar rækjur eru á marknaðinum. Rækjuveiðan er tvífaldað seinastu tvey árini, og tað má síggjast aftur. Kanadiumenn hava seinastu árini ment rækjuveiðuna munandi og tað sæst aftur á heims-marknaðinum, Annars skulu vit ikki láta so illa at. Sólborg fiskaði fyri 42 milliónir í fjør og aftaná avskrivingar vantaðu 200.000 krónur í, men eg má viðganga, at tað sær ikki bjart út nú, sigur Eiler Jabobsen.

Skipari á Sólborg hendan túrin var Pól Johan Poulsen av Strondum, hann skiftist við Jónfríð Poulsen av Skála at føra bátin.

Tá veiðan er løgd upp fer Sólborg á sleipistøð at pussast upp, og síðan verður lagt aftur vestur í hav á Flemmish Cap at royna eftir rækjum.

Har hevur viðrað sera illa í seinastuni. Høgifossur er til fiskiskap á Flemmish Cap í løtuni og aðrir rækjubátar royna undir Grønlandi.